SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Ráðharrin hevur borið seg skeivt at, men tað má ikki endurtaka seg*

*Fredrik Reinfeldt*

# Tiltøk verða tulkað sum krígsavbjóðing

**Umfatandi tiltøk ímóti Norðurkorea verða tulkað sum krígsavbjóðing, sigur stýrið í Pyongyang.**



*Ein suðurkoreanskur og fýra norðurkoreanskir hermenn á vakt við markið landanna millum. Myndin er tikin í morgun í bygdini Panmunjeon, sum er á sjálvum markinum.*

Meðan altjóða samfelagið umhugsar, hvussu tað skal revsa Norðurkorea fyri at hava sprongt eina kjarnorkubumbu, ávarar norðurkoreanska stýrið umheimin ímóti at leypa framav.

– Verða umfatandi tiltøk sett í verk, fara vit at tulka tey sum eina krígsavbjóðing, sigur ein norðurkoreanskur embætismaður við suðurkoreonsku tíðindastovuna Yonhap í dag.

– Tess størri trýstið verður, tess hvassari verður okkara svar, sigur embætismaðurin.

Samstundis sigur formaðurin í norðurkoreanska tjóðartinginum, at amerikanski politikkurin mótvegis landinum er avgerandi fyri, um Norðurkorea fer at royna fleiri kjarnorkubumbur. Í samrøðu við japonsku tíðindastovuna Kyodo sigur Kim Yongnam, at Norðurkorea er til reiðar at koma aftur til samráðingar um landsins kjarnorkuætlanir, um so er, at USA ógildar síni handilstiltøk ímóti landinum.

### Tørv á neyðhjálp

Reyði Krossur stúrir fyri, hvat fer at henda, um møgulig tiltøk ímóti Norðurkorea eisini fara at umfata neyðhjálp. Sum er fær Norðurkorea neyðhjálp frá ST-felagsskapum, Reyða Krossi og grannalondunum Suðurkorea og Kina. Og hendan hjálp er neyðug, sigur leiðarin á uttanlandsdeildini hjá Reyða krossi í Noregi, Fossum Lauritzen. Hann sigur við Dagsavisen, at steðgar neyðhjálpin, fer tað at kosta mong mannalív í Norðurkorea.

– Vit vita ikki við vissu, hvussu mong kunnu doyggja, men vit halda, at millum tríggjar og fýra milliónir norðurkoreanar eru deyðir í hungri síðani 1995. Støðan er sera hættislig, og næstan hvørt ár verður landið rakt av vatnflóð ella turki, sigur Fossum Lauritzen.

Hann metir, at seks milliónir fólk ella ein fjórðingur av norðurkoreanska fólkinum hava tørv á neyðhjálp, og at átta milliónir norðurkoreanar hava tørv á heilivági frá altjóða hjálparfelagsskapum.

### Brynja seg

Í Suðurkorea fyrireika myndugleikarnir seg til at svara hóttanini úr grannalandinum. Yoon Kwangung, verjumálaráðharri, segði í dag, at landið fer at útvega sær fleiri vápn, nú Norðurkorea hevur roynt eina kjarnorkubumbu.

– Vit fara at útvega okkum útgerð, so vit kunnu fremja neyv álop á goymslustøðir og samferðslukervið við teirra kjarnorkustøðir, segði Kwangung í einari røðu í tjóðartinginum fyrrapartin.

# Svenskir ráðharrar longu í trupulleikum

**Mentamálaráðharrin hevur ikki goldið sjónvarpsgjald í fleiri ár, og handilsmálaráðharrin hevur ikki fylgt reglunum í skattalógini.**

Nýggja borgarliga stjórnin í Svøríki hevði ikki sitið meiri enn eina viku, tá tær fyrstu gølurnar byrjaðu.

Blaðið Expressen hevur avdúkað, at Cecilia Stegö-Chilo hevur ikki goldið sjónvarpsgjald seinastu 16 árini. Nú umsitur hon millum annað sjónvarpið.

– Hetta er serstakliga óheppið, sigur ráðharrin við Expressen og umber seg við, at hon hevur verið so nógv uttanlands hesi árini. Men hon hevur búð í Svøríki síðani 1997, men kortini eru tað bara fimm dagar, síðani hon og maðurin skrásettu seg sum sjónvarpshyggjarar.

Men tað er ikki bara Cecilia Stegö-Chilo, sum er komin í trupulleikar, síðani hon gjørdist ráðharri. Expressen hevur eisini avdúkað, at Maria Borelius, handilsmálaráðharri, og maðurin skulkaðu sær undan at gjalda arbeiðsgevaragjald, tá tey høvdu fólk at ansa børnunum í nítiárunum.

Orsøkin var ikki pengatrot, tí Borelius-hjúnini forvunnu 16,7 milliónir svenskar krónur í nítiárunum, og í 1993 fekk Maria Borelius eini hús frá pápa sínum. Rætt er tað, at tað var maðurin, sum forvann teir mestu pengarnar, og nú vil Maria Borelius vera við, at tey bæði hava skilt síni fíggjarligu viðurskifti sundur, so hør hevur sítt.

– Hon skuldi sjálvt rinda lønina hjá teimum, sum ansaðu børnunum, og hennara inntøka var vanlig ella ein av teimum lágu, sigur talsmaður hennara við Expressen. Blaðið ivast í hesum og vísir á, at í meðal forvann Maria Borelius 380.000 svenskar krónur um árið í nítiárunum.

### Fleiri avdúkingar

Fredrik Reinfeldt, forsætisráðharri, er ikki fegin um tað, sum er komið fram um teir báðar ráðharrarnar.

– Maria Borelius hevur borið seg skeivt at, og vit mugu bera so í bandi, at slíkt hendir ikki aftur, sigur hann við svenska útvarpið. Hann leggur tó dent á, at handilsmálaráðharrin fær ikki sekkin.

Nú er so eisini komið fram, at Maria Borelius koyrdi við kenning fyri 18 árum síðani, og mentamálaráðharrin viðgongur nú, at hon hevur heldur ikki hildið skattalógina, tá hon hevur havt fólk at ansa sínum børnum.